# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Sleppa at prógva sítt virði

Loksins komu samgonguflokkarnir ásamt um nevndarbýti á tingi seinnapartin í gjár. Relevanti spurningurin varð sjálvandi settur, um hetta ber boð um arbeiðslagið í nýggju samgonguni, ella hetta bert skal fatast sum endaligu samráðingarnar, sum ikki vóru komnar heilt upp á pláss.

Tað skulu vit ikki taka dagar ímillum her. Hinvegin kunnu vit staðfesta, at samráðingarnar millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldið og Miðflokkin eru tær landsstýrissamráðingarnar í søguni, sum eru fingnar skjótast frá hondini. Tað tók eina viku hjá flokkunum at skipa samgonuna, og tað er ongantíð hent áður. Fyrstu samráðingarnar eftir nýggju stýriskipanarlógini vóru í 1998. Tá tók tað 15 dagar hjá Anfinn Kallsberg at skipa samgngu. Í 2002, tá fullveldissamgongan misti meiriluta – og fekk Miðflokkin afturat, tók tað teimum 37 dagar at skipa samgongu. Tað tók Jóannes Eidesgaard 14 dagar at skipa ABC-samgonguna eftir valið í 2004, og tað tók honum eina viku at skipa CHE-samgonguna á kyndilsmessu farnu.

Fleiri atfinningarsamar røddir hava verið frammi og víst á, at tað er sera óheppið við eini 17-manna samgongu. Rætt er tað, at ein persónur nú kann avgera lagnuna hjá samgonguni. Taka vit farnu ABC-samgonguna sum dømi, so misti hon tvær ferðir tingmenn. Einu ferðini var Johan Dahl stoyttur, tí hann ikki vann formanssessin í Sambandsflokkinum. Hina ferðina vísti Alfred Olsen sína misnøgd í sambandi við 266b, at hann meldaði seg úr samgonuni. Hesi mál fingu onga avleiðing – og tey mundu vera fá, sum skiltu støðuna hjá hesum tingmonnum, og spurningur er, um teir í veruleikanum fóru úr samgonguni ella ikki. Johan Dahl kom seinni inn aftur í Sambandsflokkin.

Var talan um eina 17-manna samongu, so hevði hetta helst ikki borið til. Atli Dam plagdi at siga, at tað var lættari at stýra við eini 17 manna samgongu, tí tá visti hann, hvar hann hevði fólkini. Og nógv er í hesum orðum. Tað sleppa Jóannes Eidesgaard og Høgni Hoydal at prógva – saman við John Johannessen og Annitu á Fríðriksmørk, sum eru leiðarar flokkanna á tingi.

Sum vit hava nevnt áður, so er kyndilsmessusamgongan eitt spennandi eksperiment, sum so avgjørt eigur at fáa sín kjans. Hon skal m. a. stinga út í kortið, hvør gongda kompromisleiðin er á ríkisrættarliga økinum – og finna fram til, hvønn veg vit skulu ganga í alheimsgerðini til tess at tryggja okkum góða marknaðaratgongd.

**Sosialurin**

## Stjórnarskipan Føroya og danir

**JÓGVAN SUNDSTEIN**



Hoyri í Útvarpinum, at danski forsætismálaráðharrin ávarðar føroyingar móti at samtykkja eina stjórnarskipan fyri Føroyar. Hetta ger hann eftir áheitan frá Søren Espersen frá Danska Fólkaflokkinum. Hesir báðir donsku politikkararnir óttast fyri, at nýggja uppskotið til føroyska stjórnarskipan skal ávirka viðurskiftini við Danmark og koma í andsøgn við donsku grundlógina.

Seinastu næstan 10 árini hevur verið arbeitt við uppskotinum um Sjórnarskipan Føroya. Tvær ferðir er álit handa løgmanni, seinru ferðina í desember 2006. Uppskotið, sum lá í Løgtinginum nú áðrenn valið, er eitt eitt hábærisligt og fyrimyndarligt verk, og átti at havt fingið eina betri lagnu og verið samtykt av Løgtinginum áðrenn seinasta løgtingsval, so tað kundi fari til fólkaatkvøðu, til fólksins góðkenning, nú í ár.

Nýggja samgongan ynskir at avgreiða málið nú, og tað rokni eg við, at øll andstøðan eisini fer at taka undir við av fullum huga. Tí eigur hetta at vera gjørt uttan nakran óneyðugan steðg. Hetta eigur eisini at verða gjørt uttan uppílegging frá danskari síðu. Her snýr tað seg um at smíða yvirorðnaðar karmar fyri tilveru føroyinga á Føroya landi. Sum tað stendur í innganginum til stjórnarskipanina: “Vit, fólkið í Føroyum, samtykkja hesa stjórnarskipan okkara. Hon er grundarlag undir stýri okkara og tann fyriskipan, ið skal tryggja frælsi, trygd og trivnað okkara”.

Viðvíkjandi donsku grundlógini er at siga, at hon í vissum førum kann vera góð, men hon er ikki longur nøkur serlig fyrimynd fyri stjórnarskipanir. Hendan føroyska stjórnarskipanin er væl betur í sínum orðingum. Hinvegin er einki, so vítt eg kann meta, í føroyska uppskotinum, sum stríðir ímóti ásetingum í donsku grundlógini, hvørki serstøkum orðingum ella “andanum” í lógini. Harafturat er at siga, danska grundlógin ongatíð er góðtikin av føroyingum sum stjórnarskipan í Føroyum. Føroyar eru sostatt ongatíð limaðir inn í danska ríkið sum partur av Danmark.

Tí vóni eg, at lagt verður til brots nú at fáa avgreitt hetta týdningarmikla mál. Seta danir seg ímóti, má stríðið takast við teir. So má tað vísa seg, um vøkru orð teirra um ókreinkiliga sjálvsavgerðarrætt føroyinga hava nakað veruligt innihald, ella bert eru tóm orð.

## Undanførsla frá Marin Katrinu Frýdal

**SJÚRÐUR OLSEN**
býráðslimur



Svarið hjá Marin Katrinu Frýdal at ongin fólk eru á Tekniski fyrisitingini hjá komununi er tað reina tvætl. Tað er formaðurin hjá teknisku nevnd, sum raðfestir, hvørji mál skullu fyri nevnd at fáa viðgerð og sum limur í teknisku nevnd havi eg ikki sæð hesi mál fyri nevndini um ferðslutrupuleikar á Velbastað og Hvítanesi.

Annars er at siga, at kostnaðurin hjá umsitingini hjá komununi er farin frá 36 mill til 58 mill í hesi 3 árini, Marin Katrina og hennara samgonga hava sitið. Passandi at spurt, hvat hesir pengar verða brúktir til.

## Matiné í Havnar Kirkju leygardagin

**TÓNLEIKUR**

Leygardagin 16. februar kl. 11.30 verður matiné í Havnar Kirkju við floytur við fylgispæli framføra sonatir fyri floytu av Händel, Telemann, Fesch og Blavet. Teir trýggir fyrstu er allir úr Tysklandi, Blavet er franskmaður. Teir livdu og virkaðu allir sum tónleikaskøld í tíðini um 1700. Henda tíðin verður í tónleikasøguni rópt baroktíðin og vanligt var at nýta ljóðførini cembalo og gambu til fylgispæl tá ið floytur, violin ella annað spældu teirra sonatur.

Leygardagin spælir Gudmund Mortensen á cembalo, sum Musikkskúlin eigur, og næmingar spæla saman við honum á cello. Hettar ger, at floyturnar fáa best møguligt fylgispæl til teirra lætta og ljósa klang, soleiðis at innihaldið í tónleikinum kemur klárt og týðuliga fram.

Tónleikur, sum ljóðar frískliga ljóst, við skjótum rørslum og vøkrum løgum. Tónleikur, sum hóskar væl til dámin av komandi ljósari tíðum við vári og fuglsangi. Sum eisini var vanligt fyrr í tíðuni verður urgan í Havnar Kirkju nýtt til fylgispæl í tveimum av sonatunum.

Floytuspælarar henda dagin eru Mia Káradóttir, Kamilla Ravnsfjall, Marta T. Johannesen, Elsa Maria Dam, Durita Jóansdóttir og Valborg Joensen.

Cellospælarar eru Kristina á Váli, Anna Smith, Kjartan Jespersen og Rúni Bláfoss.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.